# Leivur farin

**30. des. 1925 - 23. jan. 2010**



Leivur er farin 84 ára gamal. Leivur varð føddur í Hovi, sonur Jaspur og Josefinu Hammer. Hann vaks upp í Hovi í einari ríkari bygdamentan, sum hevði røtur heilt aftur í høvdingatíðina.

Leivur, eitt veit eg, at tú hevði ikki vilja, at eg í minningarorði mínum hevði róst og upphevja teg. So hevði tú sagt við einum brosi: »Sit og tig við tær«, sum tú ofta gjørdi, tá slíkt kom fyri. Men Leivur, eg sleppi ikki undan at nevna ávíst, tær og tínum lívi viðvíkjandi, skal nakað niðurfestast.

Tá Leivur kom til mans, fór hann til sjós, sum aðrir dreingir tá í tíðini. Hann sigldi bæði við trolara, línubáti og slupp. Á ungum árum tók hann skiparaprógv í Havn. Hann var vitugur maður, honum dámdi væl at lesa. Meinkunnugur var hann við ættarsøgu í Hovi og visti nógv at fortelja úr Hovs søgu, og søgu úr Suðuroy sum heild.

Sum ungur drongur fór hann sum aðrir at finna sær gentu. Ikki fór hann langt, gentuna fann hann í bygdini, og tað var Jastrid Tausen. Tey giftust og fingu 5 børn saman: Sonju, Egil, Elin, Jónleivur og Dagbjart. Leivur og Jastrid fingu eitt langt lív saman. Á tremur við kærleika, sátt og semju. Tey náddu at halda 56 ára brúdleypsdag saman. Umframt síni børn, fróddist Leivur nógv um síni abba- og langabbabørn. Leivur og Jastrid fingu ikki bara viðrák í lívinum. Sjúka kom í húsið, tá dótturin Sonja bleiv sjúk av liðagikt og kom at vera bundin at rullustóli. Tey fluttu við húsi til Havnar í 1973 fyri at kunna vera um Sonju, og har veita henni ta hjálp, har kundi fáast. Tað má hava verið sera trupult hjá einum fiskimanni at flyta av bygdini við konu og børnum, men kærleikin kennir ikki mørk - hesaferð til Sonju. Sonja leið av svárari píni, meðan sjúkan breyt hana niður. Tað má hava nívt tey sáran at síggja kæra barn teirra fara ígjøgnum hesar líðinar og ikki kunna veita linning til hana.

Leivur fór at arbeiða í Havn og bygdi hús á Peder Head. Sonja fekk ikki nøktandi hjálp her. Hon var noydd at flyta av landinum. Hon kom at búgva einsamøll í Rødovre í Danmark, langt frá sínum kæru. Í 1992 fluttu Jastrid og Leivur enn einaferð aftur, hesaferð av landinum. Nú vóru tey ikki ung longur og heilsan ikki hin besta, aftan á eitt langt lív við stríði og strevi. Eg havi mangan spurt meg, hvussu tey kundu orka hetta. Tey fluttu í íbúð við síðurnar av hjá Sonju. Har komu tey at húsast til stóra hjálp, gleði og troyst fyri Sonju.

Eg kom til Havnar fyri 32 árum síðani. Skjótt bar saman millum meg og hesa serliga hjartagóðu familu. Eg, konan og børnini eru komin á Peder Head til tey fluttu niður. Eisini hava vit fleiri ferðir vitja í Rødovre. At vitja Leivur var nakað serligt. Tú var altíð betur fyri, tá tú fórt avstað aftur, enn tá tú kom. Hjartalagið var av einum slíkum slag, at ringt var at finna líkan. Ein sansur, sum ongin vil vera fyri uttan, og ongin vil vera langdur undir ikki at hava, er tann humoristiski. Henda sansin átti Leivur, Hetta gjørdi, at vit komu at hava mangar ógloymandi, gevandi og stuttligar løtur saman, sum enn sita fastur, djúpt í mínum sinni. Tær vekja mangan góð minnir. Tá eg kom inn á gólvið, var altíð tað fyrsta hann segði: »Jastrid, gev hvalbinginum ein drekkamunn, rossi er svangt«, og við sínum serliga brosi. Leivur var sera góður við Jastrid, og helt seg vera sera heldigan at hava fingið hana til konu, dugnalig og røsk sum hon er. Hann segði mangan fyri mær, tá lagið var gott: »Eg fekk ta penastu gentuna í Hovi«. At hon var vøkur, tað helt hann alt lívið.

Leivur og Jastrid komu heim at vitja síni kæru seinasta heyst, og búðu hjá Elini. Hetta kom at vera hansara seinasti túrur. Lívsins sigling var lokin, árarnar lagdar inn um stokkin fyri seinastu ferð.

Sonja góða, tankarnir leita til tín og Michael í Rødovre. Nú kemur ongin pabba niður aftur at vitja og vera um teg. Hann sum tú altíð tosaði um, og vart so góð við.

Góða Jastrid og tit sum Leivur var so góður við. Nú sita tit eftir við sakninum og sorgini. Má Harrin troysta tykkum í hesum døgum.

Við hesum orðum vil eg lýsa frið yvir minnið um Leiv Hammer.

**Arnold Eyvindsson**

# Vodafone - nýggjur leiðari á virkisrøktini



Í sambandi við at leiðarin á virkisrøktini hjá Vodafone, Oddur Rasmussen, hevur avgjørt at fara undir hægri útbúgving á sumri 2010, er nýggjur leiðari settur í hetta starv. Nýggi leiðarin er Birgir Nielsen.

Birgir er 43 ára gamal. Hann er útbúgvin Cand Merc, umframt at hann hevur banka- og leiðsluútbúgving. Hann er havnamaður, giftur og eigur ein son.

Birgir kemur úr einum starvi sum umsitingarleiðari hjá Selmar Nielsen Arkitektar. Frammanundan hevur Birgir starvast 13½ ár í Eik, har hann seinastu árini var vinnulívsleiðari í Havn og frammanundan hesum vinnuráðgevi í Eik. Birgir hevur harumframt lært og arbeitt í Føroya Banka í trý ár.

Birgir byrjar í starvinum sum leiðari á virkisrøktini hjá Vodafone 1. februar 2010.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Torbjørn Lisberg, Trongisvágur,** andaðist í heiminum týsdagin 26. januar, 88 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrshúsi fríggjadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju leygardagin klokkan 13.

**Leivur Hammer úr Hovi** fer til gravar úr Hovs kirkju mánadagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið ætla at lata blómur ella krans, kunnu í staðin lata Diabetisfelag Føroya eina gávu.

## Merkisdagar

**60 ára føðingardagur**
Mánadagin 25. jan. fylti Jóna Borg Dahl, í vági, 60 ár. Dagurin verður hildin í Billardhúsinum leygardagin 30. jan. frá kl. 13 til 17, har øll eru vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
1. feb. verður Hans Poulsen, Klaksvík, ættaður av Eiði, 80 ár. Føðingardagurin verur hildin 6. feb. hjá dótturini í Kristiansgøtu 37, Hoyvík frá kl. 17.

**90 ára føðingardagur**
Sunnudagin 31. jan. fyllir Anna Louisa Jacobsen í Skálafirði 90 ár. Dagurin verður hildin í Kelduni í Skálafirði frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 2. feb. hava Jóhan Petur S. og Lis Olsen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kafeteria í Kelduni í Skálafirði týskvøldið 2. feb. frá kl.18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 29. jan. hava Ingibjørg og Olfert Debes á Oyri gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familju, leygardagin 30. jan.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 30. jan. hava hjúnini Anny og Pole Klein, Vestmanna, gullbrúdleyp. Tey, ið vilja heilsa uppá gullbrúðarparið, eru vælkomin millum kl. 11 og 15 til morgunmat í kaffistovuni inni á Fjørð.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 31. jan. hava hjúnuni Sonja og Hans Olaf Andersen í Lopra gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

**Gullbrúðleyp**
Mánadagin 1. feb. hava Guðrun og Poul Øregaard, Kollafjørð, gullbrúðleyp. Dagurin verður hildin í Danmark saman við børnunum.

**Diamantbrúdleyp**
Í dag 29 . jan. hava Katrina og Thomas Juul við Skipá, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 5. feb. hava Aðalbjørg og Sigurd Joensen í Oyndarfirði diamantbrúðleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 6. feb., kl. 15, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 6. februar. giftast Niza Pardillo, av Filipsoyggjunum og Hans Hilmar Johannesen av Toftum. Vækomst verður á Svangaskarði kl. 19. Tey, ið ynskja, at gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um, at siga frá á tlf. 748134/448134 innan 2. februar.

**Prógv**
Henrik Weihe Joensen, Hoyvík, hevur tann 15. januar lokið prógv sum Cand.jur. á Københavns Universitet.

